# Úr Fuglafirði til Falster

**Lívið og náttúran í Fuglafirði seta sín serliga dám á listaframsýning á Falster seinni hendan mánaðin**

LISTAFRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Á páskum fara listamenninir Frits Johannesen, Øssur Mohr og Heðin Kambsdal at hava felags listaframsýning á Galleri Arleth á Falster. Sum kunnugt eru teir allir úr Fuglafirði, og tað fer eisini at seta sín serliga dám á framsýningina, sambært stigtakararnum.

## Føroyska ljósið

Á Galleri Arleth fegnast tey um høvið at vísa ymisktlitta Føroyska ljósið í tulkingum hjá trimum so ymisktháttaðum listamonnunum.

Í skrivi frá gallarínum verður víst á, at Fuglafjørður er ein virkin lítil býur, har stórir trolarar úr øllum Europa dagliga landa sína veiðu, meðan bygdafólkið samstundis livir siðbundna bygdalívið við seyðahaldi og hoygging. Tað er millum annað hesir mótsetningar saman við skiftandi ljósinum, sum ganga aftur í myndaligu tulkingunum hjá Fritsi Johannesen, Øssuri Mohr og Heðini Kambsdal.



*Á páskum fara tríggir fuglfirðingar at seta sín dám á framsýning á Gallerí Arleth á Falster*

## Naivt og dramatiskt

Myndirnar hjá Frits Johannesen hava ofta ein naivan dám – ein máliháttur, sum kanska hongur saman við skapandi arbeiðinum saman við børnum, sum altíð hevur spælt ein stóran leiklut í lívinum hjá listamanninum og læraranum. Við bæði álvara og humor og ikki minst musikaliteti málar Frits Johannesen poesiin í føroysku tilveruni.

Hóast Øssur Mohr er tann yngsti av teimum trimum listamonnunum, hevur hann longu vunnið altjóða viðurkenning. Øssur Mohr sýnir javnan fram runt um í Europa, har hansara kensluliga ekspressionistisku málningar hugtaka. Hann hevur gjørt tað til sítt eyðkenni at vísa skiftandi huglagið, tá ljósglottarnir fara dansandi eftir føroysku fjøllunum.

Sum listamaður bleiv Heðin Kambsdal tíðliga ávirkaður av impressionismuni hjá Jóannis Kristiansen, sum serliga sæst aftir í mátanum, Heðin Kambsdal manir fram ljósið í myrkrinum.

Eitt av gjøgnumgangandi myndevnunum hjá Heðini Kambsdal er Blábjørg, sum reisa seg myrk og svinn yvir lívið í bygdini. Í myndunum hjá Heðini Kambsdal er ljósið altíð nærverandi, ofta leikandi lætt, men tá myrkrið gerst tættari gerast tær dramatiskar, sum fáar.

Framsýningin á Galleri Arleth letur upp 20. mars og verður at síggja fram til 4. mei.


*Ljósið í myrkrinum geva ofta málningunum hjá Heðini Kambsdal eitt serliga dramatiskt huglag*


*Myndirnar hjá Frits Johannesen hava ofta ein serliga naivan dám*


*Ljósglottar, sum fara dansandi eftir fjøllunum kring Fuglafjørð, er vorðið eitt av eyðkennunum hjá Øssuri Mohr sum listamanni*

*Skaldsøgan Barabbas er ein viðkomandi lýsing av rótleysa, modernaða menniskjanum*




# Barabbas á føroyskum

**Í gjár kom heimskenda skaldsøgan hjá Pär Lagerkvist, Barabbas út á føroyskum í týðing eftir Eilif Samuelsen**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í gjár gav forlagið Hemlið út klassikaran Barabbas eftir Pär Lagerkvist. Tað er Eilif Samuelsen, sum hevur týtt bókina til føroyskt.

## Rótleysa menniskja

Hóast skaldsøgan Barabbas kom út longu í 1950, stendur hon enn sum ein bæði beinrakin og viðkomandi lýsing av modernaða menniskjanum.

Søgan er bygd yvir tann søguliga Barabbas, ránsmannin, sum varð latin leysur í staðin fyri Jesus. Í Barabbas lýsir Pär Lagerkvist rótleysa skeptikaran, sum leitar eftir meining og kærleika í einum heimi uttan Gud, men sum verður verandi innilæstur í sínum egna veruleika.

## Trúarkreppa

Bert hjá fáum øðrum rithøvundum, eitt nú hjá Albert Camus, fáa vit eina so sterka lýsing av modernaða menniskjanum í djúpari trúakreppu.

Ritverkið hjá Lagerkvist snarar støðugt kring spurningar sum óndskap, ræðslu fyri deyðanum og um, hvørt Gud er til. Sjálvur gjørdi Lagerkvist uppreistur móti strangu trúnni hjá foreldrunum og segði hann seg vera ”Ein trúgvandi uttan trúgv, ein religiøsur ateistur”

Í 1951 fekk Pär Lagerkvist Nobelvirðislønina fyri bókmentir.

Til ber at lesa fyrsta kapittul í føroysku týðingini av Barabbas á heimasíðuni hjá forlagnum www.hemlid.fo